# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Meinhard Hellá, Sandavágur** andaðist 19. mai á Ellisheiminum í Miðvági 91 ára gamal.

**Rigmor Heinesen Miðvágur**, andaðist 19. mai á Landssjúkrahúsinum 86 ára gomul.

**Tordis Jóhannusen fødd Sámuelsen, ættað úr Klaksvík**, búsitandi á Sørarnøy, Norra, andaðist á Bodøsjúkrahúsi í dag, 69 ára gomul.

**Dagurin í morgin**

**23. mai. Desiderius.** Tvey halgimenni bera hetta navn. Annar var biskupur í Langres í Fraklandi, tikin av døgum í 364 ella 411. Hin var biskupur í Vienne í Fraklandi, steinaður til deyða í 608. Týdningurin er hin ynskti.

## Birgir Toftheyggj 50 ár

Leygardagin 20. mai rundaði Birgir Toftheyggj við Toftir í Hvalba 50 ár. Birgir er ikki eitt menniskja, ið ger nakað hóvastak burturúr sær sjálvum. Altíð so friðaligur og vælfyrireikaður, áðrenn hann talar og handlar. Neyvan áhugaður at síggja sín persón nevndan og róstan alment. Hóast so er, vilja vit fegin spinna honum ein søgutráð á 50 ára degnum.

Birgir er elsti sonur av trimum børnum hjá Annu og Hans Toftheyggj við Toftir í Hvalba.

Ungur fór Birgir í timburlæru hjá Odmar við Sílánni á Tvøroyri. Væl hevur ligið fyri hjá honum sum timburmaður. Meira enn 30 ár eru farin innan timburyrkið, og væl hevur hilnast, tí handverkið er honum í blóðið borið úr báðum ættum.

Í mong ár arbeiddi Birgir saman við Jens Paula Holm við Neyst í Hvalba. Seinni saman við Vilmund Michelsen av Tvøroyri, Danjal Olsen og Tommy Olsen úr Hvalba. Síðstnevdu arbeiðir hann saman við enn. Eisini hevur hann ávísar tíðir arbeitt sjálvur, og mong eru dømini um vakurt handverk m.a. "Træslottið" undir Myllifossinum við Hamarsá.

Faðir Birgja, Hans Toftheyggj, var kongsbóndi Uttan Knúka, ein hagi á 3 merkur úti í Vatnsdali í Hvalba, eitt langt lívsskeið. Birgir fyldi trúfastur hansara fótafetum frá smádreingi av. Fyri nøkrum árum síðani legði Hans frá sær, og Birgir tók við festinum eftir faðir sín, soleiðis sum siðvenja hevur verið millum ættarliðini. At bóndast hevur verið hansara stóri áhugi, og í nógv ár hevur hann eisini havt neyt. Ikki er tað so langt síðan, at tað stóð at lesa í bløðunum, at vistfrøðiligt



neytakjøt var tøkt í Hvalba frá Birgja Toftheyggj.

Hans, Birgir og Hanus – trý ættarlið hava rikið saman Uttan Knúka í mong ár, og ætt og vinir hava verið við, og stuttligt hevur verið í haganum. Út á dagin, tá rakstrarfólkið troytt og væluppløgd koma heimaftur, koma øll hvørja ferð til búgvið borð við Toftir. Søgurnar, ið fylla rúmið ein slíkan dag eru góðar og stuttligar, og lagið lætt og gott. Nakrar av løtunum eru partvís søga í dag. Teir eldru av rakstrarmonnunum gjøgnum fleiri ártíggju eru falnir frá sjálvum rakstrinum. Teirra millum, faðir og svigarfaðir Birgja og trúfasti rakstrarmaður og vinur Birgja, Sigvald Hentze, ið ikki er okkara millum longur.

Birgir bygdi sjálvur húsini við Toftir og skapti eitt vakurt og hugnaligt heim saman við ungdómsunnustuni, Sigrun. Eins og í ævintýrunum giftist tey og fingu børn, eina dóttur og ein son, og liva tey, eins og í ævintýrunum, vónandi lukkuliga til teirra dags enda...higartil hevur so í øllum førum gingið væl. Dótturin, Margretha, lesur til sjúkraástøðing í Esbjerg, og sonurin, Hanus, lesur á Miðnámsskúlanum í Suðuroy. Ikki kann sigast annað enn at Birgir altíð hevur gingið høgt uppí børnini og familjuna, og at tey øll eru ógvuliga tætt knýtt.

Síðstu árini hevur Birgir verið degnur í Hvalbiar kirkju. Tokkin til kirkjuna og at tæna kirkjuni, hevur hann ikki frá fremmandum. Móður Birgja, Anna Toftheyggj, f. Skaalum, helt Hvalbiar kirkju reina og vakra alt sítt virkna lívsskeið, og sat í kirjuráðnum, eins og Birgir situr í kirkjuráðnum í dag. Eisini hevur Birgir havt fleiri álitisstørv í sóknini, m.a. nú í vatnsýninum og grindaformaður.

Birgir er trúgvur áskoðari hjá Royn á heimavølli og hevur nú í fleiri ár verið ein av trúgvu álitisfólkunum til basararnar hjá Royn.

Á 50 ára degnum var Birgir burturstaddur í Esbjerg. Dagurin var hildin saman við vinmanninum Pól, hjá Mariu Olsen úr Hvalba, ið eisini rundar tey 50. Pól ynskja vit eisini hjartaliga tillukku. Dagin hildu teir saman við sínum kæru. Vónandi í fagrasta sólskyni, tí leingi hevur verið umrøtt, at eitt heilt lamb skuldi grillast undir opnum himni.

Vit í Garðsenni í Hvalba, vilja við hesum heiðra Birgja og takka honum fyri, at hann altíð hevur verið so góður at heita á. Birgir er okkum ein góður svigarsonur og svágur, og vit ynskja honum hjartaliga tillukku, við ynski um eitt framhaldandi ljóst og eydnuríkt lív.



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin



Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli:

## Dugnaskaparroynd í motorlæru og sigling

Teir sum fingi dugnaskaparroynd í Motorlæru eru: Julian Eliasen, Magni Blástein, Eliesar Olsen, Torkil Hansen (Lærari), Heini Eysuroy, Rúni Heðinson Johannesen, Hans Jacob Simonsen.

Myndin sýnir teir sum fingu dugnaskaparroynd í sigling. Aftast frá vinstru: 1 Kristian Poulsen (lærari), 2 Jógvan Biskupstøð, 3 Ali Celebi, 4 Jóan Pauli í Dali, 5 Jón í Dali, 6 Steinbjørn í Dali, 7 Beinir Hansen, 8 Hans Hansen, 9 Jan Otto Holm.

Fremst frá vinstru: 1 Petur Hans Dahl (lærari), 2 Andrass Arge, 3 Birgir Jakobsen, 4 Eyðun Joensen, 5 Regin Joensen, 6 Ingi Justinussen, 7 Súni Lamhauge, 8 Bent Lundsgaard, 9 Bogi Slættanes, 10 Jón Thorsteinsson.

Sosialurin
www.sosialurin.fo